Tann næstbesta føðingardagsgávan

Borgarstjóri og framstandandi vinnulívsmaður fegnast um silvurið hjá NSÍ og siga við ein munn, at nú er slóð ruddað til fyrsta føroyameistaraheitið hjá felagnum – næsta kappingar

FM-KAPPING
Jan Müller

Neyvan nakrantíð í nýggjari føroyskari fótbóltssøgu hevur eitt lið verið so fegið um eitt nr. 2 pláss og so inniliga fortjent tað, sum tá NSÍ vann á KÍ seinasta sunnudag í Klaksvík. Liðið, sum eitt skifti lá á odda í 1. deild og hevði beina kós móti sínum fyrsta FM-heiti síðani stovnanina fyri 45 árum síðani, hevði ikki neyðugu heiðursmerkjarutinuna til hesaferð at vinna gullið. Men tað er greitt, at við fleiri av landsins mest evnaríku spælarum á liðnum verður NSÍ eitt av teimum tungu liðunum til FM-kappingina 2003 og eitt av boðunum uppá FM-heitið.

Vit hava arbeitt við hesum og trúð uppá tað í nógv ár. Hevði roknað við at vit rukku langt í ár men ikki so langt sum til nr. tvey, segði Jónsvein Knudsen eftir dystin móti KÍ

Mynd: Jan Müller

-Gongur væl við ítróttinum, so gongur eisini væl við øllum øðrum, helt Rodmund Nielsen, sum sjálvandi fegnaðist, nú kommunan tykist hava bitið seg fasta í fótbóltsoddinum.

Mynd: Jan Müller

Fegin vinnulívsmaður

-Hetta úrslitið hevur ómetaliga nógv at siga fyri alt plássið og samanhaldið her. Vit hava arbeitt við hesum og trúð uppá tað í nógv ár. Hevði roknað við at vit rukku langt í ár men ikki so langt sum til nr. tvey. Sigur ein av royndu vinnulívsmonnunum og fyrrverandi fótbóltsspælarunum í Runavík, Jónsvein Knudsen, sum var millum mongu fegnu NSÍ-áskoðararnar í Klaksvík sunnudagin – og millum fyrstu viðhaldsfólkini, sum tustu út á vøllin, tá dómarin hevði bríkslað dystin av.

- Sjálvandi hevði eg vónað, at vit vunnu gullið eisini. Men vit kundu næstan ikki koma nærri enn at vinna bæði steypakapping og silvur. Eg havi sjálvur spælt í NSÍ og veit, at ítrótturin gevur plássinum nakað. Eg eri góður við hetta plássið og vil at NSÍ einaferð skal gerast Føroyameistari.

Jónsvein Knudsen fylti 45 ár sunnudagin, tá spælt var móti KÍ. Í ár hevur NSÍ eisini 45 ára stovningardag, og Jónsvein Knudsen hevði tískil vónað, at gullið eisini fór at verða í hús. Tað hevði verið besta føðingardagsgávan til bæði hann sjálvan og til Runavíkina. Men kortini – hetta var so tann næstbesta føðingardagsgávan.

Borgarstjórin í fremstu røð

- Gongur væl við ítróttinum, so gongur eisini væl við øllum øðrum. Tað gevur ringvirkningar. Bjartskygni í Runavík er stórt, og har eru nógv skapandi fólk. So gongur væl hjá okkara fótbóltsliði, er tað við til at lyfta alt upp her á plássinum. Hetta sigur ein ovurfegin borgarstjóri í Runavík, Rodmundur Nielsen, sum sat í fremstu røð á áskoðarabonkinum í Klaksvík sunnudagin. Hann heldur NSÍ hevði uppiborið henda sigurin, hóast hann var tepur. Men hann ætlar sær so ikki at geva uppat. Nú er málið 1. pláss og gull. Bæði borgarstjóri og vinnulívsmaðurin Sosialurin hitti á vøllinum eftir dystin eru samdir um, at NSÍ nú fer at fyrireika seg til at vinna FM heitið næstu ferð. Og við verandi manning skuldi góður møguleiki verið fyri tí. Sosialurin ynskir NSÍ tillukku við silvurinum.

B36–VB 6-0 (5-0):

B36 gjørdi av við VB í vetrarfrí

Eftir fyrsta stóra hálva tíman var B36 á odda 5–0, og so tóktist tað, sum um allir pakkaðu saman í Gundadali

FÓTBÓLTUR
Jóannes Hansen

Tá ið síðsti landskappingardysturin í Gundadali var 35 minuttir gamal, var B36 á odda 5–0 ímóti VB. Vágbingar tóku seg ongantíð saman, og tað er væl skiljandi, at B36 gav uppat, tá teir væl og virðiliga høvdu gjørt sín part. So bíðaðu teir eftir, um EB/Streymur nú fór at gera nakað við GÍ. Tað gjørdu teir ikki.

Á VB liðnum var verjuálitið Eyðun Jacobsen burtur. Tað hevði stórar trupulleikar við sær fyrsta hálva tíman. Serliga var tað í vinstru, at tað var heilt galið. B36 menninir dusaðu sær, og Heini í Skorini og Niels Joensen komu ferð eftir ferð í støður, har teir høvdu tíð og pláss at leggja innfyri.

Tá B36 hevði skorað fýra ferðir, varð Mortan úr Hørg fluttur út í vinstra verjuborð hjá VB at tippa. Tað varð væl frægari, men sjálvandi var einki hjá VB at gera. Teir vóru aftanfyri við fimm málum, og so ráddi í 2. hálvleiki um at avmarka avhølvingina. Tað høvdu B36 menninir einki ímóti, og so varð tað ein av teimum friðarligu 2. hálvleikunum.

Málini

Jákup á Borg gav sær sjálvum sjálvsálit undan landsliðsferðini. Hann skoraði í 6. og í 21. minutti. Í tí fyrra førinum stútaði hann úr fýra metrum, eftir at Heini í Skorini hevði lagt innfyri, og í seinna førinum var hann púra blankur, eftir at Arnbjørn Danielsen hevði stungið fram ímillum.

Jákup á Borg styrkti sær um sjálvsálitið undan landsliðsferðini við teimum báðum fyrstu B36 málunum

Jens Kristian Hansen, sum hesa ferð var miðvallari, meðan Klæmint Matras var í miðverjuni, stútaði til 3–0 í 26. minutti. Eitt bleytt fríspark varð lagt úr høgru, bólturin næstan datt á høvdið á veteraninum, og tað var akkurát soleiðis, at hann – altso bólturin! – vann inn um strikuna.

Magni á Lakjuni skoraði til 4–0 á hálva tímanum, og aftur var talan um innlegg úr høgru. Tað var tað eisini, tá aftasti maður, Egil Zachariassen, eftir hornaspark og út frá aftur umsetti innlegg frá Jákupi á Borg.

B36 setti punktum, tá ein tími var farin. Innleggið kom úr høgru, og Heini í Skorini stútaði umvegis tvørtræið og í kassan. So var 6–0, og allir uttan landsliðsmenninir fóru í vetrarfrí – um teir ikki høvdu pakkað saman undan og undir síðsta dystinum!

Dysturin í tølum

B36-VB 6-0 (5-0)
1-0: Jákup á Borg 6
2-0: Jákup á Borg 21
3-0: Jens Kristian Hansen 26
4-0: Magni á Lakjuni 30
5-0: Egil Zachariassen 35
6-0: Heini í Skorini 56
Dómari: Lassin Isaksen
B36: Rene Tórgarð - Arnbjørn Danielsen, Egil Zachariasen, Klæmint Matras – Niels Joensen, Kenneth Jacobsen, Jens Kristian Hansen, Iulian Florescu – Heini í Skorini, Jákup á Borg, Magni á Lakjuni
VB: Bjarni Johansen – Michael í Lágabø, Predrag Zivkovic, Magni Jacobsen – Dan Djurhuus, Palli Augustinussen, Marek Wierzbicki, Mortan úr Hørg, Nenad Zivanovic – Robert Cieslewicz Jón Pauli Olsen

Skeið fyri felagslimum og álitisfólki innan sáttmálaøki hjá FA

Føroya Arbeioarafelag skipar fyri tveimum skeioum fyri felagslimum og álitisfólki, skeioini veroa í viku 45.

Hvat er skeioio um?
Hvat er Føroya Arbeioarafelag?
Hvussu er føroyski arbeiosmarknaourin uppbygdur?
Hvat er sáttmálasamráoingar?
Hvat er eitt álitisfólk?

Nær verour skeioio?
Nr.1 – mánadagin 4. nov. til mikudagin 6. nov.
Nr.2 – mikudagin 6. nov. til fríggjadagin 8. nov.

Hvar verour skeioio?
í hølum FA's í Tjarnardeild 7, 100 Tórshavn

Tilmelding:
Tey io hava áhuga í at luttaka, veroa biðin um at booa frá hjá limafeløgunum.

Møguleiki er at gista – bioi um pláss hjá F.A.

Á hvørjum skeioi kunnu 20 fólk luttaka, og veroa skeioini bert um nóg stór undirtøka er.

Tilmelding í seinasta lagi 18. oktober 2002.

Føroya Arbeioarafelag
Tjarnardeild 5-7
Postsmoga 56 · 110 Tórshavn
Tlf. 312101 faks 315374
t-post: fafelag@fafelag.fo

LØGMANSSKRIVSTOVAN

Aðalstjóri til Almannamálaráðið

Samsvarandi styriskipanarlógini, er avrátt at byta Trivnaoarmálaráoio í tvey, so at landsstýrismenninir í ávíkavist familju- og heilsumálum og almannamálum, hava hvør sína fyrisiting. Søkt verour tí eftir aoalstjóra til Almannamálaráoio.

Starvio
Aoalstjórin er ovasti ráogevi hjá avvaroandi landsstýrismanni og hevur ábyrgdina av dagligu leiosluni, menningini og rakstrinum av Almannamálaráonum. Almannamálaráoio fyrisitur almannamál og javnstøoumál.

Arbeiosøkio fevnir í høvuosheitum um at
- samskipa uppgávur innan almannaøkio
- umsita almannamál, herundir javnstøoumál
- fyrireika lógir, kunngeroir og reglugeroir innan alt virkisøkio
- gera samfelagsvísindaligar útgreiningar innan almannaverkio
- hava eftirlit vio stovnum undir Almannamálaráonum og
- aorar viokomandi uppgávur, sum hoyra virkisøkinum til

Almenn førleikakrøv
Umsøkjari skal hava útbúgving frá lærdum háskúla og hava leiosluroyndir frá almenna ella privata arbeiosmarknaoinum ella útbúgving og royndir, io kunnu javnsetast vio hetta. Umráoandi er, at tann, io settur verour, hevur evni at seta í verk fyriskipanir, hevur nútíoar leiosluegi nleikar, góo greiningarevni, innlit í politisk viourskifti og vitan um tær treytir, io eru galdandi í eini politiskari fyrisiting. Dentur verour lagdur á persónligar eginleikar so sum evni til at eggja og menna leiðarar og starvsfólk, góo samstarvsevni, vilja til at royna nyggj virkisøki og áhuga fyri avbjóoingum.

Setanarviourskifti
Starvio er tænastumannastarv og er flokkao í 39. lønarflokki umframt eina ikki eftirlønargevandi viobót uppá kr. 3.984,75 um mánaoin. Starvsheitio er aoalstjóri. Setanarøkio fevnir um Almannamálaráoio, stovnar undir tí, Løgmansskrivstovuna og hinar ráostovurnar. Tænastustaourin í løtuni er Almannamálaráoio.

Nærri upplýsingar
Nærri upplýsingar viovíkjandi starvinum fáast vio at venda sær til Marjuna Hanusardóttir, løgmansstjóra, tlf. 35 10 10.

Umsókn
Umsóknir vio upplýsingum um útbúgving, royndir og møgulig viomæli, skulu stílast til løgmann, og sendast til
Løgmansskrivstovan
att.: Marjun Hanusardóttir, løgmansstjóri
Postsmoga 64
FO-110 Tórshavn

í seinasta lagi mánadagin 4. november 2002. Allar umsóknir veroa viogjørdar í trúnaoi.

Tvingsilssøla

Hósdagin, 7. november 2002, kl. 10.45 verður á Dómaraskrivstovuni, C. Pløyensgøta 1, 100 Tórshavn, hildin tvingsilssøla yvir ognina matr. nr. 1115, Klaksvík (AS 2-7/2002).

Talan er um sethúsaogn, sum liggur Stangaskákið 19 í Klaksvík. Grundstykkið er sambært tingbókini stórt 586 m².

Húsini eru sambært tryggingarskjalinum uml. 47 m² í tveimum hæddum við loftið og eru innrættað soleiðis:

Miðhædd: Køkur við vanligum hvítvørum, stova og gangur.

Loftshædd: 4 sovirúm, wc og brúsa.

Kjallari: Kjallarin hevur vanliga innrættingarhædd, við stoyptum gólvi og er helvtin av kjallaranum avskildraður við partvísari innrætting.

Til ognina hoyrir eisini ein eldri hjallsgrund og eitt neyst.

Víst verður annars til tvingsilssøluuppstillingina, harundir skrásetingarnotat, sum er gjørt í sambandi við tvingsilssøluna.

Tvingsilssølan er umbiðin av Jógvan E. Ellefsen, adv., Yviri við Strond 4, 100 Tórshavn, tlf. 311260 (saknr. 4383601), sum kann geva upplýsingar um ognina og sum nærri avtala kann gerast við, um ynski er at síggja ognina.

Tvingsilssøluuppgerð kann umbiðjast hjá nevnda advokati ella hyggjast ígjøgnum á Dómaraskrivstovuni.

Føroya Fútirættur,
tann 4/10-2002

LANDSVERKFRØÐINGURIN

Útbjóðing av asfaltarbeiði

í sambandi vio asfalteringina av Vágatunlinum og tilkoyringarvegunum, verour koyringin av blandaoa asfaltinum, o.u. 10.000 t., booin út í almenna lisitatión.

Frágreioing og treytir fáast vio at venda sær til Landsverkfrøoingin, Tinghúsvegi 5, Tórshavn.

Tilboo skulu sendast í afturlatnum brævbjálva til:
Landsverkfrøoingin, Tinghúsvegi 5,
Postboks 78, 110 Tórshavn
og merkjast: »Tilboo uppá asfaltkoyring«.

Tilbooini skulu veroa okkum í hendi í seinasta lagi 18. oktober 2002, kl. 15.00, tá io tey veroa opnao her á skrivstovuni.

Landsverkfrøoingurin

Kantinufólk søkist

Til at matgera fyri umleið 40 fólkum 5 dagar um vikuna, søkja vit fólk at byrja beinavegin

Arbeiðstíðin er frá kl. 8.30-13.30
Løn samb. avtalu

188 Hoyvík - Tel. 353040 lok. 20 - att. Sigrun av Reyni

Handil til sølu

um hóskandi boo fæst.

Tlf. 312385

veitst tú ikki tað?

Sosialurin